## Kia Carens:
# Sjey persónabilur við 5 ára garanti

Kia Carens er ein heilt nýggjur bilur, sum av álvara hevur tikið upp kappingina við 7-persónabilarnar á marknaðinum. Bilurin er serliga gjørdur til evropeiska marknaðin, har hann skal kappast upp á bæði kvalitet og prís. Eisini er hann designaður á evropeisku miðstøðini hjá Kia í Rüsselsheim í Týsklandi.

Carens er rúmligur við sera liðiligari innrætting, t.d. eru aftastu setrini gjørd soleiðis, at tey kunnu leggjast niður uttan nakað hóvasták. Hetta fyri at tað skal vera so lætt og liðiligt sum gjørligt at broyta í kabinuni, alt eftir hvussu nógv fólk og viðføri er í bilinum. Aftastu setrini eru eisini lætt atkomulig. Bilurin er væl egnaður til familjur við fleiri børnum

Koyrieginleikarnir eru sum á einum evropeiskum bili við t.d. »multilink« bakhjólsupphangi og fastari fjaðraskipan, sum ber vektina væl. Carens hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir sum t.d. ABS við EBD, airbag framman, í síðunum og gardinairbag, aktivar nakkastúttur og ESP við TCS.

Kia Carens hevur 5 ára garanti og fæst við 2,0 litur bensin- og dieselmotorum við ávikavist 145 og 140 hk.

Bensinútgávan kostar **kr. 239.800,** meðan dieselútgávan kostar **kr. 299.800.**




## Kia Ceed:
# Sjey ára garanti og seks stjørnur

Kia tóku allan bilheimin á bóli, tá teir fyrr í ár komu á marknaðin við nýggja Kia Ceed, við at bjóða 7 ára garanti upp á bilin.

Koreanararnir satsa eisini alt upp á hendan bilin, sum teir vænta fer at verða mest seldi Kia nakrantíð. Bilurin er gjørdur á eini av heimsins mest framkomnu bilverksmiðjum í Slovakia.

Bilurin fær sera góð skotsmál frá evropeiskum motorjournalistum, sum ikki ivast í at Kia við hesum bilinum hava góð kort á hondum í hørðu kappingini um evropeisku kundarnar.

Í Danmark gav FDM bilinum 6 stjørnur, sum er heilt óvanligt. Í grundgevingunum verður m.a. sagt: »Kias nye europeiske familjebil har god brugsværdi, udmærkede køreegenskaber, en god pris og ikke mindst Danmarks bedste garanti. Her er noget, vi ikke har set før«
Kia Ceed fáast við fýra ymiskum motorum, trimum bensin og einum diesel. Bensinmotorarnir eru: 1,4 við 109 hk og 1,6 við 122 hk. Dieselútgávurnar eru: 1,6 við 115 hk og 2.0 við 140 hk.

Kvaliteturin merkist allan vegin ígjøgnum, bæði innan og uttan. Alt er so gjøgnumført og væl gjørt. Bilurin hevur allar tær innbygdu trygdarskipanir, ið eru í øllum nútímans bilum, sum t.d. 6 airbag, ABS og ESP sum standard.
Kia Ceed kemur skjótt sum stationcar og seinni eisini sum sedan.

Prísirnir byrja við **kr. 184.800** fyri ein 1,4 litur bensin við 109 hk. Dieselútgávan við 115 hk byrjar við **kr. 226.800.**




# Suzuki – Føroya me



## Suzuki Liana

Suzuki Liana er ein rúmligur 5-persóna familjubilur, sum fæst við nógari eykaútgerð sum t.d. heilautomatiskum klimaanleggi, 15" alufelgum, el-rútum, el-speglum við hita, síðupanelum og radio við fløguspælara, ið verða stýrd frá rattinum.

Tann dýrasti Liana »S-útgávan« er útgjørdur við ma. komplettum spoilarasetti, blankt poleraðum alu-felgum o.a. kostar bert 185.990,-

**úr kr. 169.990**



## Suzuki Ignis

Suzuki Ignis er ein rúmligur og bíligur bilur við fimm hurðum og er eins væl egnaður til býarkoyring sum til longri túrar á landsvegi.

Ignis fæst við 1,3 og 1,5 motorum við ávikavist 99 og 107 hk. Fæst eisini sum ein tann bíligasti 4x4 á marknaðinum.

**úr kr. 129.990**

fæst eisini sum vørubilur



## Suzuki Sx4

Suzuki SX4 er ein 5-persóna familju- og frítíðarbilur til nógv ymisk endamál. Innrættingin er liðiligari við sera góðum plássi.

SX4 fæst við 1,5 og 1,6 litra motorum við ávikavist 99 og 107 hk, og sum 4x4.

Bilurin hevur t.d. aircondition, síðupanel, takboylar, el-rútar, el-spegl við hita, radio við fløguspælara, ið verða stýrd frá rattinum.

**úr kr. 176.990**

Tað er ikki uttan orsøk at Suzuki hava lagt seg á odda, sum mest selda bilmerki í Føroyum. Suzuki hava eina breiða skrá við nógvum ymiskum modellum frá minibilinum Swift til Grand Vitara, sum fæst við nógvari útgerð.

Felags fyri allar Suzuki er at teir sera bíligir í mun til sína støðd, góðan bil fyri pengarnar og ein kahaldi.

**Berg Motors Sp/F · Staravegur 1-3 · FO-11**